# Skynsemi ræður í ársfíggjarætlan fyri 2009

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



Besta amboð okkara at reka ein skynsaman fíggjarpolitikk er at gera raðfestingar.

Sum landsins størsta kommuna fylgja vit við altjóða gongdini á fíggjarøkinum og ásanna samstundis, at vit eru partur av teirri heild, ið myndar heimsbúskapin.

Í tí dagliga hava vit lært okkum, hvussu samansettur prísurin á olju kann vera, ikki bara eftir framleiðslukostnaðinum, men eisini virðinum á dollaranum.

Við hepni hevur Tórshavnar kommuna lagt dentin á ein varligan og ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, ið setir trivnaðin hjá bæði borgarum og starvsfólkum í hásæti. Yvirskipað hava vit staðið fyri umsitingarligum og politiskum opinleika.

Málið er at hava eitt gott tænastustøði til borgaran í Tórshavnar kommunu. Hinvegin er karmurin eitt støðugt skynsemi og førleikin at møta truplum tíðum.

Eftir lokna setu hevur landsins størsta kommuna nátt teim málum, sett vórðu, støðugt havandi skynsemið og hugsjónina um burðardygd fyri sær.

Raðfestingin, sum er gjørd eftir tørvi, merkir, at ávís øki verða sett í gongd, meðan onnur øki mugu bíða.

Fíggjarætlan fyri Tórshavnar kommunu í 2009 fer til fyrstu viðgerð í býráðnum mánadagin 20. oktober 2008. Dagin eftir, týsdagin 21. oktober 2008 kl. 9:00 verður tíðindafundur.

# Vit tóku trivnaðin og umhvørvið í álvara

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri



Fyri fýra árum síðani legði Tjóðveldi til brots fyri at sleppa upp í aftur meirilutan í Tórshavnar Býráð. Tá høvdu vit sitið í minniluta eitt valskeið, meðan ein borgarlig samgonga ráddi á Vaglinum.

Vit fingu eitt gott val og okkara umboðan vaks enn einaferð – hesaferð úr trimum upp í fýra býráðslimir. Og hartil vóru kynini javnbjóðis umboðað við tveimum kvinnum og tveimum monnum.

Eftir ymsum sniðgøtum, sum ofta hendir í kommunupolitikki, eydnaðist okkum at koma í samgongu saman við Javnaðarflokkinum, eina samgongu við fýra kvinnum og trimum monnum. Sermerkt og óhoyrt í Havnar 100 ára býráðssøgu.

Býráðssamgongan setti sær fyri at veita borgarunum betri tænastur og leggja dent á trivnaðin hjá børnum so væl sum vaksnum. Tað var okkum greitt, at skuldi hetta fremjast, so fór tað kosta nakrar skattakrónur.

Vit hava bøtt um mangar tænastur í kommununi hesi árini. Leggjast kann fyri við Bussleiðini, sum í dag er eitt munandi betri alternativ til bilferðsluna, enn hon var.

Bussarnir koyra nú tríggjar ferðir um tíman móti tveimum ferðum um tíman, og hartil er koyringin við Bussleiðini ókeypis, tí kommunan rindar allan hennara rakstur. Hetta hevur víst seg at vera eitt átak, sum fólk í úti í heimi halda vera eitt tað mest sjónliga umhvørvisátakið, sum yvirhøvur er tikið.

Foreldrini gjalda í dag heldur minni fyri barnsansingina. Foreldraparturin er settur niður í 25 prosent úr 30 prosentum. Haraftrat er systkinaavsláttur settur í verk á vøggustovum og barnagørðum, og nú sleppa skúlabørn í 2. flokki í frítíðarskúla. Tað sluppu tey ikki frammanundan. Barnafrádrátturin er eisini farin upp.

Vit settu eldraráðið á stovn fyri trimum árum síðani. Tíðliga í skeiðnum lat heimið fyri minnisveik í Vallalíð upp við 16 búplássum, og vit hava syrgt fyri, at Tjarnargarður í Stoffalág er útbygdur við 24 hart tiltrongdum røktarheimsplássum.

Vit hava eisini útvegað sambýli til 10 fólk í einum stórum sethúsum í Mattalág. Nú verður arbeitt við nýtíðar eldra- og røktarheimi úti við Strond, har grundstykkið er útvegað undir Boðaneshamri.

Vit hava lagt stóra áherðslu á umhvørvismálini. Brennistøðin á Sandvíkarhjalla er í hesum skeiði dagførd fyri tíggjutals milliónir, so hon lýkur øll tey krøv, sum ES setir til slíkar støðir og tað útlát, sum úr teimum má koma.

Plássið við brennistøðina er munandi betur skipað, so øll, sum hagar koma við sínum ruski, sleppa lættliga og skjótt ígjøgnum. Har er reistur nýggjur bygningur, so arbeiðast kann undir taki, serliga við tí vandamesta burturkastinum.

Við somu reinførissøk fyri eyga hava vit lagt okkum eftir at dagføra undirstøðukervið undir jørð, tað er kloakkirnar kring um í kommununi. Mong ótespilig útlát vóru. Tey eru fækkað munandi, og fyri rættvísisakir skal sigast, at nakrar tíggjutals milliónir av skattakrónum eru farnar til endurbøtan og nýgerð av kloakkunum.

Tað er grundin til, at vegir og strendur, áir og vágir eru so rein, sum tey eru, hóast vit ikki eru komin heilt á mál enn.

Alt hetta og meir aftrat er framt til tess, at øll skula kunnu trívast í Havnar Kommunu.

# Samstarv báðar vegir

HELGI ABRAHAMSEN



Seinasta mikudag viðgjørdi løgtingið eitt uppskot frá Anniku Olsen um ættleiðingarstuðul. Hetta uppskotið varð upprunaliga lagt fram, meðan uppskotsstillarin var partur av táverandi andstøðu. Men síðani eru politisku kortini blandað av nýggjum, og Annika Olsen er nú partur av einum landsstýri, sum um stutta tíð ætlar at koma í løgtingið við einum líknandi uppskoti. Tí valdi hon at taka sítt uppskot aftur, fyri at landsstýrisuppskotið kundi verða samtykt. Ein annar møguleiki hevði verið, at uppskotið bleiv viðgjørt í løgtinginum, og so kundu broytingar verið gjørdar í trivnaðarnevndini, sum samsvaraðu við ynskini hjá landsstýrinum.

Báðir møguleikarnir kundu verið brúktir, men hon valdi tann fyrra.

Skipanin í løgtinginum er soleiðis, at tá ein uppskotsstillari biður um at fáa eitt uppskot afturtikið, kunnu onnur nokta fyri hesum, og tað var júst tað sum hendi týsdagin 30. september. Tá løgtingsformaðurin boðaði frá, at Annika Olsen hevði biðið um at fáa uppskotið um ættleiðingarstuðul afturtikið, reistust Bergtóra Høgnadóttir Joensen og Kári á Rógvi og boðaðu frá, at tey noktaðu fyri, at uppskotið bleiv tikið aftur. Tí bleiv uppskotið viðgjørt á tingfundinum mikudagin 1. oktober.

Men nú skrivar Bergtóra H. Joensen í bløðunum, at tað er sera harmiligt, at tað í føroyskum politikki mangan er so, at heldur enn at fremja skilagóðar avgerðir og raðfestingar, er mest umráðandi, at politikarin sjálvur fær æruna av einum uppskoti.

Eg eri púra samdur við hesum. Men eg má kortini spyrja: Um Bergtóra meinar nakað við hetta, hví lat hon so ikki Anniku Olsen taka sítt uppskot aftur? Hví var tað so umráðandi fyri Tjóðveldi, at tað bleiv hetta uppskotið og ikki tað hjá landsstýrinum, sum bleiv viðgjørt? Er hetta ikki júst eitt dømi um, at spurningurin um hvør skal fáa æruna teldur meira enn sjálvt uppskotið?

Bergtóra H. Joensen endar greinina við hesum orðunum: "Samgongan ynskir samstarv – tað eri eg „við uppá“..... men samstarv gongur sum kunnugt báðar vegir."

Eg eri púra samdur – tað eigur at ganga báðar vegir!

# Tølini tala fyri seg

SJÚRÐUR OLSEN
býráðslimur



Eg haldi, at ein og hvør, ið bara hevur eitt sindur av fíggjarligum skili, eigur at síggja á tølinum, at kommunan er fíggjarliga elendiga stýrd av samgonguni í Tórshavnar komunu (Tjóveldi og Javnaðarflokkinum).

Raksturin er farin úr 312 mió. kr. í 2004 til 485 mió. kr í 2008. Ein øking við 173 mió. Kr. Heili 55% uppá bert 4 ár.

Um hettar var í einari privatari fyritøku, hevði øll leiðslan verið koyrd til hús.

Alt hetta óskilið ger, at komunan kemur at hava trupuleikar at gera neyðugar íløgur í framtíðuni.

Tjóveldi fór til síðsta val við slagorðum sum álit, gjøgnumskygni, opinleiki og mangt annað slíkt. Nú fýra ár seinri kunnu vit bara ásanna, at ongantíð hevur meira skuggaskotspolitikkur verið førdur av Vaglinum sum nú, og ongantíð áður hevur borgarin havt so ilt við at fáa nakran dialog við kommununa.